# Keane vil hava Venables

Royn Keane, sum í dag er venjari hjá Sunderland, heldur Terry Venables vera besta boðið upp á ein nýggjan írskan landsliðsvenjara. –Hann hevur hópin av royndum, og kann hann virka til at betra um írskan fótbólt, so hví ikki. Í mínum hugaheimi hevur tað ongan týdning, at hann ikki er íri, sigur Roy Keane.



# Giggs virdur ov lítið

Ryan Giggs, sum um vikuskiftið skoraði sítt mál nummar 100 fyri Manchester United, fær alt ov lítla virðing. Tað heldur liðfelagi hansara, Rio Ferdinand. – Tað eru spælarar, sum ikki røkka 100 dystum, so at skora 100 mál er heilt fantastiskt. Og eg haldi tað slettis ikki vera løgið, at ein spælari av hansara kalibur røkkur hesum marknasteininum. Og sum heild haldi eg, at fólk virða hansara avrik ov lítið, tí hann er veruliga í heimsflokki, segði Rio Ferdinand millum annað um liðfelagan.

Kyndil-H71 25-23 (14-15):

# Kyndil aftur á beint




*Verjan stóð framúr væl, og saman við frálíkum málmansspæli var tað hetta, sum tryggjaði Kyndli fyrsta sigurin í góðan mánað*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Verjan var avgerandi, tá Kyndil við fyrsta sigrinum í ein mánað vann seg afturí dystin um bronsukrónurnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kreppan hevur klórað hjá meistarunum úr Kyndli. Liðið, sum aloftast ger um seg í oddinum av talvuni, hevur havt tað sera tungt hetta kappingarárið, og skuldi nøkur vón vera, var neyðugt við tveimum stigum móti hoyvíkingum.

H71 hevur hinvegin tikið fleiri á bóli, og við einum sigri kundu teir bíta seg fastar í hini bæði oddaliðini.

### Stríð og rót

Dystirnir millum tey bæði liðini eru ofta merktir av stríðsvilja og intensiteti. Og dysturin sunnudagin var so als einki undantak í so máta. Stórur dentur var lagdur á verjuspælið, meðan tað hinvegin haltaði nógv í álopsspælinum. Hvørgin parturin megnaði av álvara at fáa ferðina á spælinum upp, og tí bar illa til at spæla verjurnar tunnar. Og so gjørdist talan um hópin av nærdystum og tríggjametra-køstum.

Tað tóktist tó, sum skuldi H71 draga longra stráðið. Ein væl spælandi Jens Skipagøta í málinum pilkaði ferð eftir ferð royndirnar frá heimaliðnum niður, og hóast Kyndil eisini hevur góðar málverjar, so megnaðu hesir ikki rættiliga at standa ímóti á sama hátt.

Tí var tað ein dyggur smeitur hjá H71, tá Jens eftir 27 minuttum sá reytt. Upptakin var heldur óneyðug, men Jens varð fangaður á millumhond, tá Kyndil sendi Hans Áka Dal Christiansen í kontra, og so var ostaskorpan á lofti.

Men hóast hetta, so helst H71 fast. Í Levi Nybo hava teir ein finan málverja afturat, og fram til seinastu 10 minuttirnar hevði H71 yvirvágina. Tað gekk tó meira og meira striltið at fáa kúluna inn, og tá Kyndil so loksins fekk glið á sína málskjóting, koppaði dysturin. Og so hjálpti tað lítið, at Levi hevði onkra dupultbjarging móti dystarenda. Kyndil noktaði at sleppa takið, sum teir høvdu fingið í verjupartinum, og so var fagnaðurin stórur, tá seinasta floytið hevði ljóðað.

### Hanga í

Sum skipanin er nú, so tykjast StÍF og Neistin longu vera farin avstað í oddinum, har tey eru fimm stig undan teimum næstu. Men enn er dysturin um bronsuna knallharður, og fyrr hava vit sæð, at oddalið eisini kunnu snáva. Og fyrst og fremst er tað møguleikin fyri at lofta slíkum, sum Kyndil, H71 og VÍF stríðast um. Eitt stríð, har Kyndil altso vann sær ein nýggjan møguleika sunnudagin.

## FAKTA

**Kyndil-H71 25-23 (14-15)**
10 min: 5-4
20 min: 9-10
40 min: 17-18
50 min: 19-21
Málskjúttar
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 5, Janus Einar Sørensen 5, Bárður Johannesen 5(1), Hans Áki Dal Christiansen 4(1), Finnur Hansson 3(2), Hjalti Jacobsen 2, Rani Ellingsgaard 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 5(1), Halgir Dahl Olesen 4, Bárður Brimvík 4, Niels Viggo Niclassen 3, Eyðun Højgaard 2, Freddy Poulsen 2, Janus Sørensen 1, Gunnar Bláberg 1, Tróndur Vatnhamar 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, H71 3
**Útvísingar:** Kyndil 4, H71 5
**Diskvalifikatiónir:** H71 2 (Ein beinleiðis og ein fyri 3X2 minuttir)
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

# Skutu innandura

**Um vikuskiftið skipaði Tambar fyri kappingum fyri børn og vaksin í Havn**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Børnini skulu 15 metur leygardagin og tey vaksnu skutu 18 metur sunnudagin.

### Børn

Tað hevur verið trupult at skipa nakra kapping fyri compound hjá teimum yngru í ár, og er bert tann eini skjúttin Magnus Andreassen, Ørvur, sum skeyt (284+282) 566 stig.

Í bólkinum recurve vóru 12 luttakarar. Bestu innleiðandi úrslitini vóru:

Nr. 1. Bogi Andreasen, Vágaskot, (253+267) 520 stig, nr. 2 Tummas Eidesgaard, Ørvur, (250+253) 503 stig, nr. 3 Fróði Dam, Tambar, (246+241) 487 stig og nr. 4 Rani L. Beder, Tambar, (238+239) 477 stig. Allir skutu persónligt met. Annars vóru 8 persónlig met sett í recurve bólkinum.

Síðan var farið undir finaluumfarið, har byrjað bleiv við 1/8-finalunum. Fýra teir best skjúttarnir sótu yvir, dystirnir vóru hesir: Rógvi Dalsgarð og Rógvi Larsen, báðir Tambar, 93-73, Odd Andreasen og Heðin Olsen, báðir Tambar, 104-98, Sirið Rein og Rani Joensen, bæði Tambar, 99-84 og Bogi Mørkøre, Ørvur og Oddmar Nielsen, Tambar, 93-89.

¼-finalurnar: Bogi A. og Rógvi D. 99-100, Odd og Rani 99-95, Fróði og Sirið 86-96 og Bogi M. Og Tummar 90-107.

½-finalurnar: Rógvi D. og Odd 96-97, og Sirið og Tummas 79-102.

Dysturin um triðja plássið var millum Rógva D. og Sirið og gjørdist sera spennandi við bert einum stigi millum tey. Dysturin endaði 95-96.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Tummas og Odd og tað var Tummas ongan iva verða um, at hann ætlaði sær at vinna. Tummas vann kappingina við hesum dystinum 106-102.

### Vaksin

Forfall gjørdi, at tað heldur ikki hesaferð vóru so nógvir compound skjúttar við, bert tríggir luttakarar. Innleiðandi vóru úrslitini hesi:

Nr. 1 Jógvan Niclasen, Tambar, (285+284) 569 stig, nr. 2 Magnus Andreassen, Ørvur, (258+262) 520 stig og nr. 3 Kaj Johannesen, Ørvur, (225+250) 475 stig.

Farið varð beinleiðis til ½-finalurnar har Jógvan sat yvir, meðan Magnus og Kaj skutu ein javnan dyst, sum endaði við sigri til Magnus 99-97.

Dystin um fyrsta plássið vann Jógvan trygt á Magnus við 113-102.

Í recurve bólkinum vóru 10 luttakarar, har 4 av skjúttunum skutu persónlig met. Bestu innleiðandi úrslitini vóru hesi:

Nr. 1 Hans Petur Højgaard, Ørvur, (281+280) 561 stig og persónligt met, nr. 2 Eirikur í Jákupsstovu, Ørvur, (251+256) 507 stig, nr. Sjúrður Rein, Tambar, 253+241) 494 stig og Jastrid M. Jensen, Tambar, (236+241) 477 stig.

Í 1/8-finalunum sótu seks teir bestu skjúttarnir yvir, meðan hesir dystir vóru: Rakul Dam, Tambar, og Jim S. Guttesen, Vágaskot, 91-77, og Bogi Andreasen, Vágaskot, og Nikkel Petersen, Ørvur, 88-93.

¼-finalurnar: Hans P. og Rakul 108-84, Jógvan Magnus »Eggaba« Andreasen, Vágaskot, og Jastrid 95-99, Sjúrður og Andras á Lofti, Vágaskot, 111-95, og Nikkel og Eirikur 87-104.

½-finalurnar: Hans P. og Jastrid 107-99, og Sjúrður og Eirikur 106-103.

Dysturin um triðja plássið var millum Jastrid og Eirik og endaði 97-108.

Dysturin um fyrsta plássið var millum Sjúrð og Hans P. og var Sjúrður óheppin at skjóta ein píl við síðuna av og misti nøkur týdningarmikil stig. Hans P. vann dystin 110-90, og sostatt vann Hans P. eisini kappingina.

Høvuðsstuðul hjá Bogaskjótideildini er Tryggingarfelagið Føroyar.